## Gloymdu lendingarhjólini

Tveir flogskiparar hjá avstralska flogfelagnum Quantas hava fingið boð um at halda seg við hús, meðan kannað verður, hvussu teir kundu gloyma at koyra lendingarhjólini niður, tá teir skuldu seta eitt Boeing 767-flogfar á flogvøllin í Sidney. Flogfarið var komið niður í 200 metra hædd, tá ávaringarskipanin varskógvaði flogskipararnar um, at lendingarhjólini vóru ikki koyrd niður. Tá var flogfarið so lágt, at tað mátti fara uppaftur og eina rundferð, áðrenn tað setti seg í øllum góðum. Nú skal kannast, hvat fekk flogskipararnar at gloyma lendingarhjólini, skrivar Reuters.



## ST skerjir í Afghanistan

ST hevur gjørt av at flyta umleið helmingin av sínum útlendsku starvsfólkum í Afghanistan, tí viðurskiftini í landinum eru so ótrygg. ST hevur havt umleið 1.100 útlendsk starvsfólk í Afghanistan, og 600 teirra skulu flytast. AP-tíðindastovan skrivar, at fleiri útlendsk ST-starvsfólk eru longu rýmd úr Afghanistan, tí tey kendu seg ikki trygg har. ST hevur eisini sagt seg stúra fyri, at Taliban skal endurtaka tað, sum hendi tann 28. oktober, tá limir í Taliban myrdu fimm ST-starvsfólk á einum gistingarhúsi í Kabul.

# Forkromaða loysnin

**Óansæð hvussu víkur ella vendur, verður Vága Floghavn útbygd. Men sum støðan í Løgtinginum er í løtuni, tykist tað lítið sannlíkt at loysnin, sum Johan Dahl, landsstýrismaður í Vinnumálum, fer at bera í Tingið í desember, hevur nakra undirtøku**





*Forkromaða loysnin, sum Johan Dahl leggur upp til, má bíða inntil greiða er fingin á, hvar ein flogvøllur liggur best í Føroyum. Inntil tá kunnu vit byggja út á 1600 metrar, er breiða fatanin í Løgtinginum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FLOGVØLLUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Flogvøllurin skal byggjast út á 1799 metrar, og terminalurin skal dagførast, soleiðis at hann hóskar til tørvin 10 til 15 ár frammi í tíðini. Kostnaðurin er mettur til 412 milliónir krónur, við umleið 26 milliónum krónum í óvissu.

Tað var tilmælið frá P/F Vága Floghavn um útbygginina av Vága Floghavn, sum partafelagið varðar av, og hetta er sama tilmælið, sum Johan Dahl, landsstýrismaður í Vinnumálum, sum varðar av økinum, ætlar at bera í Tingið áðrenn árið er úti.

Men hetta hevur fingið tingfólk at ressast.

Fleiri røddir, seinast Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum, Katrin Dahl-Jacobsen úr Javnaðarflokkinum og Sjúrður Skaale úr Tjóðveldi í Degi og Viku mánakvøldið, hava víst á, at ongar kanningar fyriliggja í løtuni, sum kunnu vísa á, hvar ein flogvøllur liggur best í Føroyum, men at ein kanning er á veg, sum verður løgd fram í mars ella apríl, sum gevur fleiri upplýsingar at taka støðu útfrá.

### Skrumbul onga undirtøku

John Johannesen úr Javnaðarflokkinum er eitt av teimum tingfólkunum, sum eru skeptisk um uppskotið at byggja út eftir tilmælinum hjá P/F Vága Floghavn.

- Mann hevur skumpað støðutakanina um útbygging av Vága Floghavn frá sær í áratíggju, men nú stendur man í eini støðu, har tað er her og nú tað skal henda. Lat meg sláa fast, at eg haldi at hetta er samferðslutrupulleiki nummar eitt hjá okkum, og Vága Floghavn skal útbyggjast óansæð, men málið snýr seg nú um mann vil út at brúka 100 milliónirnar eyka upp á eina »forkromaða« loysn, uttan at vita nakað sum helst um, hvar ein flogvøllur liggur best í Føroyum, sigur John Johannesen.

Hann vísir á, at substansurin í málinum er tann, at inntil fleiri upplýsingar eru tøkar um, hvar frægast er at hava flogvøll í Føroyum, fyriliggja, kundi ein farið í gongd við at útbyggja flogvøllin í Vágum til 1600 metrar.

Men eitt er so at vera skeptiskur um eitt uppskot, men eitt annað er at gera nakað við tað. Hvat kann gerast fyri at steðga uppskotinum?

- Í síðsta enda er tað jú Løgtingið, sum skal samtykkja uppskotið, og tí er tað upp til tingfólkini at avgera, um hetta verður loysnin ella um man skal bíða við at taka endaliga avgerð, sigur John Johannesen.

Sum tað ljóðar í løtuni millum tingfólk, Sosialurin hevur tosað við, er ikki undirtøka í løtuni fyri at »skrumbla« hetta ígjøgnum áðrenn árið er úti, sum onkur teirra hevur málborðið seg.

### Vágar útbyggjast óansæð

Fleiri ferðir hava røddir verið frammi um, hvørt tað er rætt at brúka útvið hálva milliard krónur í Vágunum, áðrenn man veit hvar ein flogvøllur liggur best.

Av teimum 412 milliónunum, sum uppskotið er at byggja út fyri, koma 365 milliónir krónur úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar, sum eru markaðar til at byggja flogvøllin í Vágunum fyri. Sostatt snýr tað seg um tær 60 til 100 milliónir krónurnar, sum mugu dragast úr landskassanum til at fíggja restkostnaðin.

- Spurningurin er, um tú skal gera »forkromaðu« loysnina nú, og so einki diskutera aftur í 50 ár. Men óansæð, so fer ein útbygging í gongd í Vágunum, hvørt tað verður út á 1600 metrar og fyri teir pengarnar, sum eru oyramerktir til endamálið, ella uppskotið hjá Johan Dahl, sigur John Johannesen.

### Fakta á borðið áðrenn

John Johannesen sigur, at tað sum er neyðug at gera nú, er at fáa tær neyðugu upplýsingarnar á borðið, áðrenn støða verður tikin.

– Í dag standa vit í teirri støðu, at tað manglar at fáa fakkunleikan at siga, hvat ein flogvøllur liggur best. Tað má gerast áðrenn støða skal takast til útbyggingina. Tingfólkini vilja bara vita, hvat er tann besta loysnin, áðrenn tey taka støðu til, um tey skulu játta at farið verður undir hesa loysnina, sigur John Johannesen.

### Er ikki lokalpolitikkur

John Johannesen er sannførdur um, at útbyggingin av Vága Floghavn hevur verið gruggað til í nógv ár av lokalpolitikki, og sigur, at ein flogvøllur er ikki lokalmál, men eitt landsmál.

– Tað snýr seg ikki um, at